# Sorgblíður túrur í Vágar


*Tikið varð ímóti við vatnkanónum, tá flogfarið hevði sett seg*

**– Tað var ein rørandi móttøka, sum eg fekk her í dag. Hóast man er blivin 65, so hevur man kortini følilsir, sigur Hans Hansen, flogskipari.**

FLOGSKIPARIN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Loftrúmið:** Tað eru ikki smávegis túrar sum Hans hevur flogið millum Føroyar og Danmark.

Í roynd og veru eru teir um 3500 – sagt og skrivað: trýtúsundogfimhundrað! – í tali.

Neyvan man nakar annar hava gjørt honum hetta eftir higar til dags. Men í Atlantsflogi eru nógvir ungir flogskiparar, sum lættliga kunnu náa uppá eins nógvar túsundtals túrar og tímar.

Tað kundi tí neyvan undra nakran, at nú Hans gevst sum flogskipari hjá Atlantsflogi so átti tað at markerast við lít.

Tað byrjaði longu gjáramorgunin, tá flogfarið hjá Atlantsflogi lendi í Keypmannahavn. Tá teir nærkastu gate'ni stóðu sløkkiliðsbilar fyri flogfarinum og oystu tað undir í vatni sum eitt heiðursportur.

Hetta sama hendi eisini í Vágum í gjár, tá Hans lendi við flogfarinum nakrar fáar minuttir í tvey. Sama heiður hevði hesin maðurin uppiborið eisini á heimavølli.

Flogfarið setti seg og Hans hevði flogið sín seinasta túr við ferðafólki fyri Atlantsflog.

Í gjár kundi Hans flyta ferðafólk fyri Atlantsflog. Í dag var hann vorðin ov gamal til hetta, hóast ungur í sinni.

Hann hevur tó ongar ætlanir um at gevast at flúgva. Nú verða tað so ikki ferðafólk, men flogfør við øðrum farmi.

### Vemodig móttøka

Sjálvur tekur Hans tað sera róliga, nú hann gevst sum flogskipari hjá Atlantsflogi.

Útkomin úr flogfarinum í gjár stóðu bæði stjóri og starvsfólk hjá Atlantsflogi, umframt onnur starvsfólk við flogvøllin fyri honum á breytini.

Øll ynsktu tey at heiðra henda mannin, sum øll hava so gott at bera og nógv at takka fyri.

At flúgva henda seinasta túrin úr Keypmannahavn í Vágar, – jú tað hevði verið ein serstøk uppliving.

– Skal eg siga tær akkurát sum tað var, so var tað eitt sindur vemodigt. Eitt sindur spesielt!, sigur Hans.

Fyrst fekk hann eina móttøku í Keypmannahavn, og síðani eina stórfingna móttøku á heimavøllinum.

– Nei, tað hevði eg als ikki væntað. Tá ein upplivir slíkt, so kann ikki umgangast at ein blívur eitt sindur rørdur.

– Sjálvt um man er blivin 65, so kann man hava følilsini í ordan fyri tað, sigur hann.

### Egið flogfar

Hóast Hans hevur havt fulltíðarstarv sum flogskipari hjá Atlantsflogi, so hevur flogferðsla eisini tikið ein stóran part av frítíð hansara.

Sangurin aðrastaðni á síðuni vísir eisini á henda áhuga, og á áhuga hansara fyri haruskjóting.

Veruleikin er, at Hans hevur eitt annað lítið flogfar, sum hann hevur gjørt nógv brúk av.

Hinvegin so er hann ikki sleptur uppá fjall av Atlantsflogi.

– Eg skal ein túr yvir til USA eftir einum flogfari, sum vit skulu hava hagani.

– Eg skal sjálvur flúgva tað heim, sigur Hans. Hetta verður seinnapartin í apríl mánaði.

Annars hevur Hans ætlanir um at fara til Noregs at flúgva við einum smærri flogfari, sum skal gera landmátingar og annað arbeiði í tí sambandinum. Hetta verður einaferð í summar.

– Og so fari eg sjálvandi eisini at flúgva nógv við mínum egna flogfari, sigur Hans.



## Alt hann átti á fold var ein Cessna

Á samkomuni í gjár varð hesin sangurin framborin sum ein serstøk heilsan til Hans Hansen. Lagið er "Alt hann átti á fold var ein koyggja".

*Alt hann átti át fold var ein cessna*
*og hann føldi seg heima umborð.*
*Hann var gamal, men kendi seg ungan*
*Men hann teskar tó enn hesi orð:*

*Niðurlag:*
*Leið meg einaferð enn fram í klivan*
*Lat meg ganga ta seinastu vakt.*
*Lat meg stýra tann seinasta "leggin"*
*Inntil flogvøllin eg havi rakt.*

*Havi flogið við høgum og lágum*
*havi buldrast í ódn og í logn*
*havi "sæð" sjálvt í tjúkkasta mjørka*
*hvat ið Esther í ovn hevur koyrt.*

*Tá ein fríløta er man eg fara*
*út at skjóta, tað dámar mær væl*
*tá er "farligt" at vera ein hara*
*Luffa døgurðan frá mær fáa skal.*

*Tá mín schedule er komin at enda*
*og mítt tørn til at stýra er av*
*fari eg eina yacht mær at keypa*
*og so út á tað brúsandi hav.*

## Hondbóltsveitsla og nógvur tónleikur í Manhattan og Cippo

VEITSLA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Føroyskir slagarir, hondbóltsløg, ítróttarløg og DJ-show eru á skránni leygarkvøldið, tá Cippo og Manhattan skipa fyri ávíkavist livandi tónleiki og ítróttarveitslu

Leygarkvøldið skipar Cippo fyri ítróttarveitslu í sambandi við, at Landskappingin í hondbólti er við at enda.

"Vit skipaðu fyri einari fótbóltsveitslu fyri nøkrum vikum síðani í sambandi við innandurakappingina. Tað tiltakið eydnaðist so mikið væl, at vit hildu tað vera upplagt at gera eitt líknandi tiltak fyri hondbóltin", sigur Rúni Djurhuus, ið rekur ítróttarcaféina í Havn.

Hann leggur afturat, at veitslan er fyri øll og ikki bert fyri ítróttarfólk. Men tey, ið vitja staðið leygarkvøldið, kunnu tó vænta at hoyra nakrar hondbólts- og ítróttarsangir frá DJ Tummix, ið stendur fyri tónleikinum eftir midnátt.

**Fløguaktuelli**
**Rókur leggur fyri**

Rókur Jakobsen gevur fríggjadagin fyrstu fløgu sína sum einstaklingur út, og tað hevur eydnast Manhattan at fáa hann, at undirhalda við egnum og annans løgum. leygarkvøldið. Tiltakið í Manhattan og Cippo byrjar klokkan 21.

Fríggjakvøldið skipar Manhattan fyri kafékvøldi við Ronnie og Sámal. Tað byrjar klokkan 21. Aftan á livandi tónleikin fríggjakvøldið tekur Dj 150 yvir í Cippo.

## 2 ár til hjálparlæknar

Fíggjarmálaráðið hevur gjørt 2-ára sáttmála við Hjálparlæknaráð Føroya.

Karmurin er tann sami sum hjá hinum feløgunum, sum hava gjørt 2-ára sáttmála. Lønin hækkar 0,9% fyrra árið og 1,7% seinna árið.

Aðrar broytingar eru ikki gjørdar, verður at enda sagt í tíðindaskrivi.

**-mørk**